LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

**Svar**
**uppá**

**skrivligan fyrispurning nr. 43/2015 eftir tingskipanini § 52a til Aksel V. Johannesen, løgmann, frá Kára P. Højgaard, løgtingsmanni, um broyttu fortreytirnar av laksaframleiðslu í Føroyum**

**Fyrispurningurin var soljóðandi:**

1. Hvørjar ætlanir hevur samgongan til tess at tryggja, at mest møguligt av laksaframleiðsluni verður góðskað og virðisøkt í Føroyum, so at vit harvið varðveita verandi arbeiðspláss og menna nýggjar úrdráttir í hesi vinnu?

2. Hevur samgongan nakrar ætlanir um afturbering av 4,5% tøkugjaldinum til virkir, sum góðska fiskin, og í staðin hækka ella áleggja útflutningsgjald á ótilvirkaðan laks?

**Svar:**

**Til 1**. Tað er ikki skipanin við tøkugjaldi, sum er atvoldin til, at færri fólk í løtuni eru til arbeiðis at framleiða liðugt góðskaðar vørur. Tí eru útsagnirnar hjá leiðsluni á Bakkafrost misvísandi.

Tøkugjaldið er gjald fyri framíhjárættin til at ala laks á føroysku alifirðunum. Tøkugjaldið verður lagt á allan laks, sum verður tikin úr føroysku firðunum – uttan mun til, um laksurin verður seldur av landinum heilur, ella hann verður framleiddur til liðugtvøru.

Prísurin, sum verður brúktur sum grundarlag, er norski FishPool prísurin, og hann er ikki tengdur beinleiðis at prísinum, sum føroyskir alarar selja fyri. Hvørki prísurin fyri heila laksin ella fyri liðugtvøruna. Prísurin, sum verður brúktur, er ein miðalprísur fyri at útflyta norskan laks. Við verandi spotprísum rinda alifyritøkurnar umleið 2 kr. í tøkugjaldi fyri hvørt kilo av laksi, ið verður tikið. Hetta merkir, at føroyskir alararnir hava yvir 20 kr./kg eftir av reinum yvirskoti, tá ið allir framleiðslukostnaðir, renta, avdráttir og tøkugjald eru drignir frá.

Tá ein fyritøka – í hesum førinum Bakkafrost – velur at framleiða minni til liðugtvøru og heldur velur at selja meira av landinum sum heilan laks, er tað, tí prísurin fyri heila laksin gevur meira enn liðugtvøran. Hetta er ein tilvitað avgerð, sum Bakkafrost hevur tikið.

Tað er skilligt, at tá ið prísurin er høgur á rávøruni, royna fyritøkur at minka partin, sum fer til liðugtvørur, tí tað loysir seg betur at selja laksin heilan. Sum eg skilji, hevur verandi marknaðarstøða við sær, at tær flestu stóru alifyritøkurnar í heiminum í løtuni selja laksin heilan.

Sostatt hevur skipanin við tøkugjaldi einki við virðisøkingina av laksi at gera. Við verandi marknaðarstøðu í huga, eri eg fullvísur í, at hesa gongd høvdu vit eisini sæð, um einki tøkugjald var.

**Til 2.** Landsstýrið hevur ikki ætlanir um at afturbera tøkugjaldið til virki, ið góðska laks. Eg skal viðmerkja, at hetta svarið er gjørt í samráð við landsstýrismannin í alimálum.

Í Tinganesi, 21. apríl 2016

Aksel V. Johannesen
løgmaður